# Lýsingartorgið

**TELEFAX**
1 ára gamalt lítð brúkt t Brother telefax til sølu fyri 1.000,- kr. Nýprísur 2.000,- kr.
*Tlf. 222177*

**WC-KUMMA**
Hvít IFØ wc-kumma til sølu fyri 400,- kr.
*Tlf. 319902*

**TIL SØLU**
Brúkt H-Vindeyga til sølu. Breidd 110, hædd 120.
*Tlf. 447342*

**YNSKIST**
Eitt minni turt rúm til goymslu av innbúgvi til ein sámuligan prís. Ring á
*Tlf. 316475 helst eftir kl. 18.00*

**NOKIA FARTELEFON**
Ein Nokia 5510 við MP3 spælara og radio, óbrúkt, til sølu fyri 1.200.- kr.
*Tlf. 317564*

**NOKIA 7210 TIL SØLU**
Ein 1/2 ára gomul Nokia 7210 til sølu fyri einans 2.200 kr - er i sera góðum standi.
*Tlf 261167*

**BÍLIGIR FERÐASEÐLAR**
2 flogferðaseðlar Vágar-Aberdeen t/r til sølu, saman ella hvør sær, fyri kr. 2.500,- fyri báðar. Fráferð 31. juli og heimferð 18. august 2003. Ringi
*Tlf. 213722*

**MANGLAR TYKKUM FOTOGRAF TIL BRÚDLEYP?**
Um tit vilja hava professionellar myndirtav vígsluni, borðhaldinum og øðrum fyri ein góðan prís, ringið og og hoyrið nærri.
*Tlf. 317322, 228118*

**YNSKIST**
Hevur nakar flísar at geva ella selja mær bíliga? Skulu brúkast til tún.
*Tlf. 317322 ella 228118*

**KETTBER VEKTBONKUR**
til sølu fyri 2500 kr. Við vektum 60 kg. Stendur fylgja við.
*Tlf. 251572*

**FRÍMERKIR**
Danmark: Ár 2000 + 2001 stemplað (havi). Ynski: Før./GR./DK 2002-2003 (eg tosið føroyskt).
*Tlf. 0045 26747474/0045 86428627 (Danmark)*

**TIL SØLU**
Agnskerari, kveylaraspæl, egningartrakt, sveisiapparat, startari til caterpillar, typa: 3208, kavaraútgerð + luftkompressari.
*Tlf. 286222-267167*


**Landssjúkrahúsið**
FO 100 Tórshavn

## Sjúkrarøktarfrøðingur

Til barnadeildina **B4** verður søkt eftir sjúkrarøktarfrøðingi til fulltíðar avloysarastarv í skiftandi vaktum til setan 1. september 2003 til og við 29. februar 2004.

B4 er ein barnadeild við 13 plássum fyri børnum í aldrinum 0 - 14 ár. Á deildini starvast sjúkrarøktarfrøðingar, sjúkrahjálparar, pedagogur og barnalæknar.

Nærri fæst at vita um starvið við at ringja til Tove Thomsen, deildarleiðara, telefon 31 35 40, lokal 104 ella til Ásu Poulsen, leiðandi sjúkrarøktarfrøðing, lokal 300, e-post asap@lsh.fo

**Førleikakrøv:**
- prógv og góðkenning sum sjúkrarøktarfrøðingur
- góð samstarvsevni

**Fyrimun** hava umsøkjarar sum hava fakligar royndir innan røkt og viðgerð av børnum.

**Setanartreytir:**
Løn og setanartreytir smb. sáttmálan millum Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar og Fíggjarmálaráðið.

Skrivligar umsóknir við avriti av prógvum og viðmælum e.l. skulu sendast til

**Landssjúkrahúsið**
Starvsfólkadeildin
100 Tórshavn

Umsóknarfreistin er 6. august 2003 kl. 12.00


# HEILSANIR



**Góða fitta Anni-mostir**
Hjartaliga tillukku við føðingardegnum. Takk fyri alt, tú ert fyri okkum. Vit elska teg.
**Heilsan Høgni, Bjørt og Sveinur**



**Hey Ansa**
Heldur tú ikki, at mamma eigur tvey fitt børn? Og eigur tey enn.



**Góða Jana Maria**
Hjartaliga tillukku við 1 ára føðingardegnum tann 20. juli. vit halda, at tú ert so fitt.
**Heilsan mamma, babba, Dánial beiggi**



**Góða Bjørt**
Hjartaliga tillukku við 3 ára degnum.
**Heilsan Kúllarnir**



**Góða mamma**
Hjartaliga tillukku við 50 ára degnum. Vóni tú ført ein góðan dag.
**Heilsan Sundrid**



**Góða mamma og pabba, omman og abbin**
Hjartaliga tillukku við silvurbrúdleypsdegnum tann 21. juli. Takk fyri alt, tit eru fyri okkum. Muss og klemm frá
**Døtrum, svigarsynum, ommu- og abbabørnum**



**Allarbesta omma og langomma**
Hjartaliga tillukku við degnum í dag. Alt tað besta í framtíðini.
**Ommu- og langommubørn**


## Heilsanir

30,- kr. Sosialurin

**5 ferðir um vikuna**

### Gevið gætur

Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við 30,- kr. fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjald í avgreiðsluni á Argjavegi 26, millum kl. 8.00 og 16.00.

**Myndaheilsanir skulu vera okkum í hendi á miðdegi 2 dagar fyri útkomudag.** Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.
❑ Týsd. ❑ Mikud. ❑ Hósd. ❑ Fríggjad. ❑Leygard.

Tekstur:.................................................................
.........................................................................
.........................................................................
.........................................................................
.........................................................................
.........................................................................

**Myndina aftur:** Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og at leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navni og bústaði.
Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.

Sent hevur (skal fyllast út).
Navn: ...................................................................
Bústaður: ..............................................................
Bygd/býur: .................................. Tlf.: ................

Sendið lepan, mynd og gjald til:
**Sosialurin**
Postsmoga 76 •110 Tórshavn
Merkið bjálvan: »**Heilsanir**«




# TILTØK

**Hebron, Argir**
Mikukvøldið kl. 20,00 er bønarmøti.
www.hebron.fo

**Adventkirkjan**
Leygardagin kl. 11.00: Barnabíbliutími og bíbliugransking. Evni: Jesus –virðiligari og betri.

**Katólska kirkjan**
Hvønn gerandisdag kl. 17.30 Messa í Kerit.
Leygardag kl. 11.30: Messa í Kerit.
Sunnudag kl. 11.00: Hámessa í Mariukirkjuni.

**Samkoman Rhema**
*Staravegur 5*
www.rhema.fo

**Filadelfia**
*Landavegur 22*
Fríggjakvøldið kl. 20.00: Ungdómstiltak,
Leygardagin kl. 17.00: Landsbøn.
www.filadelfia.fo

**Ebenezer**
Mikukvøldið kl. 20.00: Bønar- og uppbyggingarmøti. Sonni Poulsen talar.
Leygarkvøldið kl. 20.00: Ungdómsmøti.
Øll eru hjartaliga vælkomin.
Heimasíðan: www.ebenezer.fo

**Meinigheitshúsið, Tórshavn**
Týskvøldið kl. 20.00: Bíbliutími, Áps. 17.
Mikukvøldið kl. 20.00: Húsmøti hjá Vivi og Jóhannes Hammer í Kollafirði.
Sunnukvøldið kl. 18.00: Møti v/ teimum ungu.
Ólavsøkuaftan kl. 18.00: Møti v/ Pól Johannesen. Kvinnukórið syngur. Kl. 23.00–04.00: Opið hús við café, lovsangi og andakt –øll eru vælkomin.
Ólavsøkudag kl. 18.00: Møti v/ Regin Høgnesen. Meinigheitskórið syngur.

**Samkoman Immanuel**
Mikukvøldið kl. 20.00: Møti.

**Tórshavnar Hvítusunnusamkoma**
*Yviri við Strond*
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti, kl. 18 Evangel. møti, øll eru vælkomin.

**Saron, Vestmanna**
Mikukvøldið kl. 21.00: Útimøti á Torginum. Opið hús í Saron aftaná.
Telefonandaktin 424741

**Samkoman Lívdin**
Ongi møtir verða 27. juli og 3. aug.
Heimasíðan: www.livdin.fo

**Siloa, Fuglafjørður**
Bøn, bíbliulæra og hugnalig samvera verður í Siloa mikukvøldið kl. 19.30. Kristian Hansen talar. Evni: Royndir og líðingar (Rómbr. 5:1-11). Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Lívsins Orð**
Felags húsmøti verður mikudagin kl.20.00 hjá Charles og Anthony í Saltangará.

**Keldan, Skálafirði**
Vælkomin í Kelduna.
www.keldan.fo

**Getsemane, Klaksvík**
Mikukvøldið kl.20.00 er bønarmøti
Sunnudagin kl.11.00 er møti við Kaj Meinar og Fríðbjørg Michaelsen (barnaansing er undir møtinum).
Tú ert hjartaliga vælkomin.

**KFUM & K, Klaksvík**
www.kuff.fo

**Betania, Skopun**
Mikukvøldið kl. 20.00: Bønarmøti.
Verið hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið í Skopun**
Mikukvøldið kl. 20.00: Bíbliutími. Øll eru vælkomin.

**Betel, Vágur**
Ónsdagin kl. 20.00: Bønar- og uppbyggingarmøti.

**Sion, Vágur**
Sunnudag kl. 11: Morgunmøti, kl. 18 Møti. Øll eru vælkomin.
Mánakvøld kl. 21: Bønarmøti. Frá kl. 21-23 verður bønartænasta á tlf. 373777. Tú ert vælkomin at ringja, um tær tørvar forbøn.

**Fiska- og sølutorg í Runavíkar kommunu**
Aftur í ár ætla Runavíkar kommuna og Kunningarstovan í Saltangará at skipa fyri einum fiska- og sølutorgi á gøtuni. Um viðrar, verður tað leygardagin 2. aug. 2003 Handlar, feløg og onnur, ið hava hug at verða við, verða biðin um at ringja til Kunningarstovuna í Saltangará, tlf. 449 449, áðrenn 23. juli 2003.

**Tilhaldið**
*í Tórsgøtu 21, tlf. 316491*
Opið er mánadag 10.00-18.00. Týsdag-fríggjadag kl. 10.00-17.00.
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.
**Frá 1. juli til 18. august hava vit opið frá kl. 13.00-17.00.**
Á ólavsøku verður fotoframsýning av útoyggjamyndum í kjallaranum í Tilhaldinum hjá Hjalmari Waag Høgnesen.
Á miðhæddini verður møguleiki at fáa sær ein drekkamunn og okkurt heimabakað.
Tilhaldið hevur átikið sær at hava móttøkuhúsið opið á ólavsøku.
Opið verður 28.-29. juli kl. 15-19.

*Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.*

**Tilhaldið í Sandoynni**
Tilhaldið er opið mánadag og mikudag frá kl. 14–17.00. Drekkamuður er at fáa báðar dagarnar. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Dagtilhaldið Fløvin**
kemur saman mánadag-fríggjadag kl. 15.00-18.00 í húsunum hjá Kongshavnar Kvinnufelag.

**NA (Anomymir narkomanar)**
Reinsaríið, Tórsgøta 5:
Fundur er hvørt sunnukvøld kl. 20.00 til 21.00.

## BRÚDLEYP

Sunnudagin 20. juli *giftust* í býráðssalinum í Havn Elisa Dam Joensen og Jón í Gong.

Fríggjadagin 25. juli kl. 11.30 giftast Ann Gertrud Højgaard, Tórshavn og Leif Løtzsch, Tønder, á Tønder Rådhus. Brúdleypsadressan er Ulriksallé 16, 6270 Tønder.

Leygardagin 26. juli giftast Brynhild Kalsø Hansen og Simon Lund Andersen.
Brynhild er dóttur Ásu og Villa Hansen, Sakskøbing.
Brúdleypsadressa: Kastanievej 21, 4990 Sakskøbing

Leygardagin 26. juli kl. 14.00 giftast í Havnar kirkju Ann Mari Karbech Mouritsen, Tórshavn, og Martin Eg Hoffmann, Ruds Vedby. Veitsla verður á Hotel Føroyum kl. 17.00 fyri innbodnum.

Leygardagin 26. juli kl. 17 giftast í Vesturkirkjuni Leona Ellefsen, ættað úr Sørvági, og Kári Nilssen, Lopra. Veitslan verður fyri innbodnum í Róðrarneystinum á Argjum kl. 19.00.

Leygardagin 26. juli kl. 15.00 giftast **í Betesda** í Klaksvík Anja Isaksen og Bogi Laksáfoss. Vælkomst verður í Skálanum kl. 19.00. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Leygardagin 26. juli giftast í Grundtvig Kirke í Esbjerg, Maiken Festirstein, Klaksvík, og Arnfinn Hansen, Norðragøta. Brúdleypsadressa: Toftsvej 32, 1 th, Esbjerg.

Leygardagin 2. august kl. 16.00 giftast í Elim í Søldarfirði Evi Hallursdóttir Jacobsen úr Skálabotni og Faber Isaksen úr Søldarfirði. Veitsla, sum áður var lýst at verða í Kappróðrarneystinum á Glyvrum, verður flutt í Ítróttarhøllina á Skála kl. 19.00.

Leygardagin 9. august kl. 14.00 giftast í Berøa Irdi Hansen, Saltangará, og Ken Nónklett, Glyvrar. Veitslan verður í Bygdarhúsinum í Leirvík kl. 17.00. Tey, ið vilja gleða okkum við at koma, verða biðin um at siga frá innan 2. august á tlf. 507652, 448073 ella 448149 eftir kl. 18.00.

Leygardagin 16. august kl. 16.00 giftast í Sands kirkju Arnleyð Tungá og Bergleif Sólsker, bæði av Sandi. Veitslan verður hildin í Samljóð í Skopun kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma, biðjast vinarliga siga frá á tlf. 361632, 320487, 361650 ella 258889 í seinasta lagi 1. august.

## SILVURBRÚDLEYP

Í dag, 22. juli, kunnu hjúnini Jonhild og Óla Jákup Kruse, Oyrabakka, halda silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin í heiminum leygardagin 26. juli frá kl. 18.00. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Týsdagin 5. august hava Elisabeth Hvítklett og Jógvan Joensen Sørvágur verið gift í 25 ár.
Dagurin verður hildin í heiminum leygardagin 2. august við morgunmati frá kl. 8.00. Øll eru hjartaliga vælkomin.

## PRÓGV

20. juni 2003 tók Gunnleif F. Ellefsen Blásvær prógv sum Sivil Verkfrøðingur við "Signal Behandling" sum sergrein, við Lærda Háskúlan í Aalborg.


**HAVNAR BIO**
Tlf. 31 19 56
www.bio.fo




Týsdagin 22.07. kl. 19⁰⁰ Týsdagin 22.07. kl. 22⁰⁰
Mikudagin 23.07. kl. 18³⁰ Mikudagin 23.07. kl. 22³⁰
Hósdagin 24.07. kl. 18³⁰ Hósdagin 24.07. kl. 22³⁰




Týsdagin 22.07. kl. 21⁰⁰ Mikudagin 23.07. kl. 19³⁰
Hósdagin 24.07. kl. 19³⁰




Týsdagin 22.07. kl. 19³⁰ Mikudagin 23.07. kl. 20³⁰
Hósdagin 24.07. kl. 20³⁰

**KOMANDI FILMUR**




Frumsýning
Mikudagin 23.07. kl. 23⁰⁰ Hósdagin 24.07. kl. 23⁰⁰

**Stórt úrval av DVD-filmum til sølu**